# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# LADA UPP TIL

**FORMEL 1** Fyrrverandi forsetin og núverandi premierministarin í Russlandi Vladimir Putin hevur almannakunngjørt, at navnið Lada nú verður at síggja í sambandi við Formel 1 koyring




Lada er ikki eitt bilmerki, sum verður sett í samband við Formel 1, men nú hevur fyrrverandi forsetin og núverandi premierministarin í Russlandi Vladimir Putin almannakunngjørt, at navnið Lada verður at síggja í sambandi við Formel 1 koyring. Lada skal nevniliga sponsorera Formel 1 liðið hjá Renault komandi kappingarár.

Ein orsøk til at russar sponsorera Formel 1 koyringina er at russiski kappkoyrarin Vitalij Petrov, sum tann fyrsti russarin nakrantíð, skal luttaka í hesi koyring.

Í 2008 keypti Renault 25 prosent av partabrøvunum í russisku verksmiðjuna Autovaz, som m.a. framleiðir Lada bilarnar, fyri eina milliard dollarar.

Lada hava annars ikki havt tað so gott seinastu árini. Í Danmark verða teir als ikki seldir meira.

Eftir at danski importørurin Nic. Christiansen A/S í Kolding ikki hevði selt ein einasta Lada seinastu tvey



*Lada Vaz-2105 varð gjørdur frá 1980-1992*



*Lada Niva, sum komu á evropeiska marknaðin í 1978, varða framvegis framleiddir*